**Tíðargreinin: eitt íkast til føroyska orðaskiftið**
Hevur tú hug at gera títt íkast til føroyska kjakið í 2008?
Send eina grein til dorit@sosialurin.fo
Kravið er, at greinin er áleið 6.000 tekn og skrivað í essay stíli

**Næstu ferð:**
Hanna Jensen um føroyska málið



# Jólapynt flotar einki áttamannafar



**TÍÐARGREININ**
*Nicolina Dahl*

Í vetur hava øllum kunnugt verið ikki færri enn tvinnanda val upp í røkur og fyrr í heyst var bispaval, so sigast má, at okkara fólkaræði hevur blómað hesa seinastu tíðina. Tey, ið veljast vildu, hava dyrgt og trolað, so vit veljarar vóru um at gerast í ørviti. Nógv er skrivað og røtt hetta seinasta hálva árið og mong góð orð søgd og lovað. Nú er alt yvirstaðið og vit sita við onkrum slagi av timburmonnum - einari tómari kenslu av, at nú er alt yvirstaðið. Úrslitið var kanska ikki, sum vit ynsktu - ikki hjá øllum í hvussu er - og vit granska okkum sjálvi. Skuldu vit havt gjørt soleiðis, samstundis sum vit vita, at næstu ferð gera vit á júst sama hátt.

Vit eru øll eitt sindur móð av politiska leikinum - ella kanska er tað bara valleikinum, vit eru troytt av. Alt er politikkur verður sagt og tað er sjálvandi rætt, men tað er ikki altíð, vit geva okkum far um politikkin í øllum - tað er, sum verða munirnir og sundurlyndið týðiligari, tá val er.

Mong góð orð er søgd, og hugtøk sum samhaldsfesti, rættindi teirra brekaðu, bleyt virði o.s.fr. verða tikin fram úr skjáttuni til høvið. Hetta eru hugtøk, sum minna meg um jólapyntið, sum tikið verður fram einaferð um árið. Tað verður hongt til prýðis eitt avmarkað tíðarskeið og síðan pakka niður aftur í dósir og sett á ovastaloft til næstu jól. Soleiðis eisini við nevndu hugtøkum. Flokkarnir pynta seg og sínar valskráir við hugtøkum, flest øll kunnu taka undir við, men tá valið er av, verða tey sett til viks í gerandisliga orðaskvaldrinum, sum kortini hevur meira virði fyri tey, ið á valdinum sita.

**Eru øll líka?**
Eitt valstríð avdúkar, at í politikki skulu vit øll helst vera líka. Íðan, er tað ikki gott? Jú, sjálvandi, um vit við líkheitini meina, at øll hava sama rætt og somu treytir. Men siga vit, at øll eru líka, tí at øll hava sama hugburð og somu áskoðan um tilveruna og somu ynski, so er hetta heilt skeivt. Í tí sambandi veri eg altíð ørkymlað, tá talað verður um fólkið í Føroyum sum eina einstáttaða eind. "Allir føroyingar ganga í knappatroyggju og knæbuksum og drekka snaps á Ólavsøku". Gera teir nú tað? Ja, helvtin av føroyingum er óskikkað til at ganga í knæbuksum, av teirri einføldu orsøk, at hon er av skeivum kyni, og hagtøl siga mær, at 36 prosent av føroyingum eru fráhaldsfólk og tey drekka so ikki snaps á Ólavsøku.

Eitt annað dømi, sum fær ilt í meg, er, tá ítróttarblaðfólk skriva ella siga, at allar Føroyar fylgja við landsliðnum í fótbólti og liva og anda fyri teimum vanæriligu úrslitum, sum koma. Tá havi eg altíð hug at melda meg út úr teirri samkomuni, um tað bar til, og siga, ja, kanska gera hinir 48.462 føroyingarnir tað, men ikki øll, tí sjálv hugdi eg nógv heldur at einum fronskum filmi, (sum lívið annars sigst vera ov stutt til,) enn eg hugdi bara fimm sekund at einum fótbóltsdysti, uttan mun til hvør spælir, og um eg líti uttan um meg í mínum nærumhvørvi, kom eg til ta niðurstøðu, at á sama hátt, sum eg havi tað, hava næstan øll tað. Eru tað so bara ítróttarblaðmenninir, sum vilja hava alt Føroya fólk at vera fótbóltsfjepparar? Nei, sjálvandi liggur sannleikin mitt ímillum. Nógv fólk, ja, heilt nógv elska fótbólt, men øll gera tað ikki!

**Besta land á jørð**
Vit vilja so fegin, at Føroyar eru besta samfelag á jørð og tá vit hoyra politikararnar, so ivast vit ikki í, at vit kunnu gerast uppaftur betri. Í farna valskeiði var talað um eina visión fyri Føroyar í framtíðini. Tað er gott, tá stungið verður út í kortið og hugt verður frameftir, men eg haldi, vit kunnu siga, at fólk flest fingu ongantíð rættiliga við, hvat hendan visiónin gekk út uppá. Tað ræður um at hava fólkið við sær, tá kós verður sett. Havi hugsað um, at tað var eitt mistak at brúka fremmant orð sum 'visión' um ætlanina - við at brúka fremmand orð setir ein onkusvegna frammanundan skott millum ætlan og borgara.

Men hvat er tað góða samfelagið? Tað mynstursamfelag, sum politikaranir ynskja sær, er tað sama samfelag, sum borgararnir ynskja sær? Í hvussu so er, er tað ikki vist, at øll stremba eftir tí sama. Samríkjafólk stremba valla eftir sama samfelag sum tjóðskaparfólk, vinnulívsfólk ynskja valla tað sama sum arbeiðarin, tey trúgvandi ynskja valla sama samfelag sum tey samkyndu, tey, ið vilja fjálga um grøn øki, ynskja valla sama samfelag sum tey, ið vilja leggja alt undir asfalt, og vit kundu hildið á.

Tað, sum umræður, má tí vera at finna felagsnevnaran fyri okkum øll. Hvat bindur saman heldur enn skilur sundur? Vit eru 48.463 tandur her á klettunum og kunnu vit ikki fáa hetta samfelagið at virka, sum vit vilja, er tað bæði synd og skomm. Kanska kundu vit roynt at spurt fólk, hvat tað er fyri eitt samfelag, tey ynskja sær, heldur enn at gita. Ongin hevur spurt okkum, hvussu vit ynskja okkum framtíðina í Føroyum.

**Alt ruggar ikki rætt**
Í valstríðnum kom eitt nú eyðmýkjandi til sjóndar, hvussu lága raðfesting tey hoyribrekaðu í hesum samfelag fáa. Ongin kunning vendi sær til hendan fittliga stóra og skjótt vaksandi bólk og ongin flokkur hugsaði um at teksta sínar framløgur í sjónvarpinum. Ongin valsending varð tekstað og har fyrr deyvatulkar hava verið í sjónvarpssending, sá eg ongan hesu ferð. Beint frammanundan sóu vit í sjónvarpinum venesuelska forsetan, tann umstríddað Hugo Chavez røða. Hann sat har í blóðreyðu skjúrtu síni og uppi í høgra horni var beinleiðis teknmálstulking. Eg hugsaði: sig so tað, í Venesuela duga tey okkurt, sum føroyingar ikki duga. Ber tað til at fáa tað burtur úr, at Venesuela er eitt betri land enn Føroyar at vera deyvur í? Tað veit eg av góðum grundum ikki, tí eg havi ikki verið har, men tað undirstrikar, at Føroyar ikki eru fyrimyndarligar á hasum økinum. Hetta bara nevnt, tí hetta er eitt øki, sum eg veit nakað um og har tað rakar meg, at raðfestingin er lág.

Mong onnur øki kundu verið nevnd. Øll vita, at okkum vantar læknar og tannlæknar í Føroyum, og sálarfrøðingar og fysioterapeutar tróta. Okkum vantar røktarheimspláss og búpláss til fólk við serligum tørvi. Øll uppliva vit vantandi tænastu alla staðni í samfelagnum. Tey seinastu mongu árini hava vit raðfest samferðslukervið og alt gott um tað, men verður tilveran hjá fólki sum heild betri av, at tað er lættari at koma til og frá?

Tá eg koyri gjøgnum undirsjóvartunnilin yvir í Eysturoynna er tað altíð við eyðmjúkari undran og virðing fyri teimum hondunum, sum skaptu hetta verkið, fyri tí tøkniliga kunnleika, ið liggur aftanfyri og fyri sjálvum vakurleikanum í verkinum, men er Klaksvík vorðin betri at búgva í av at fáa tunnil? Munurin er ikki eyðsýndur, men kanska skal longri tíðarskeið til at døma um tað. Fyribils kann eg bara staðfesta, at á onkrum øki er tænastustøðið her lækkað, vit missa almennar stovnar og eitt nú ber ikki longur til hjá øllum at sleppa til tannlækna her norðuri.

**Finn felagsnevnaran**
Í gamlar dagar var áttamannafarið álitið til samferðslu og sum vinnutól. Tað má undirstrikast, at grundarlagið undir, at áttamannafarið kundi brúkast, var samstarv. Har skuldi manning til. Ongin kundi rógva eitt áttamannafar einsamallur, ja, tað bar ikki so frætt sum til at flota áttamannafarið uttan samstarv. Vit eru farin frá áttamannafarinum og til hátøkni við sjeymilafetum. Hava vit mist samstarvsevnini fyri borð á vegnum?

Eg haldi, vit mugu fara at leita eftir felagsnevnarinum fyri, hvørji vit eru og hvagar vit vilja fara. Men samstundis mugu vit fáa eyguni upp fyri, at ikki allir føroyingar eru líka og at øll ikki vilja tað sama. Vit mugu burtur frá tí eintáttaða og í staðin loyva okkum at vera fjølbroytt og ymisk. Tað ljóðar kanska mótstríðandi, men tað er tað ikki. Føroyar verða bara eitt gott samfelag, um øll kenna seg at vera partur av tí. Vit mugu góðtaka ymiskan hugsunarhátt. Vit kunnu ikki loyva okkum at seta nakran uttanfyri. Tað eru vit snøgt sagt ov fá til.



Tíðargreinin